tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-04 |
| Fundardagur | 12. februar 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Marit Poulsdóttir, Jens Johannesen, Hallur í Heiðunum, Anita Vibergsdóttir og Marjun Olsen.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Hølir til lesandi um jólini | 2 |
| 2 | Ferðavinnan í Suðuroynni | 2 |
| 3 | Val av umboðum í upptøkunevdunum fyri eldrasambýli og ellis- og røktarheim | 3 |
| 4 | fígging av láni | 3 |
| 5 | Skattainntøkur 2014 | 4 |
| 6 | Útbjóðing av skúlabarnakoyring | 4 |
| 7 | Oljudálking í Landshavninum á Krambatanga 25-09-2013 | 5 |
| 8 | Sigling hjá Norrønu | 6 |
| 9 | Grannastevnur í Suðuroynni | 6 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-04 |
| Fundardagur | 12. februar 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**82.16.00-A00-1-14**

## 1. Hølir til lesandi um jólini

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 8. januar 2014, pkt. 4:**

Mælt verður til at hølini verða tøk til lesandi í ferium og annars eftir tørvi. Skulaleiðslan hevur givið játtan til hetta.

### Avgerð

Einmælt samtykt, at hølini verða tøk til lesandi í ferium og annars eftir tørvi.

**00.17.15-A00-1-13**

## 2. Ferðavinnan í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

**Vinnu- og trivnaðarnevndin, 7. oktober 2013, pkt. 1:**

Ebba Julsgart vitjaði nevndina.

Spurningurin er, um Tvøroyrar Kommuna vil vera við í ferðavinnunevndini?

Og hvat væntar kommunan av luttøkuni?

Nevndin mælir til, at Tvøroyrar Kommuna aftur fer undir at gjalda limagjald til ferðavinnunevndina í fyribils eitt ár. Ein meting av úrslitinum skal gerast næstu ár, og støða takast til um kommunan framhaldandi skal vera við. Umboðið hjá Tvøroyrar Kommunu hevur

lovað, at hon vil arbeiða fram ímóti at fáa opnað kuningardeskin á Krambatanga aftur.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-04 |
| Fundardagur | 12. februar 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 8. oktober 2013, pkt. 6:**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá vinnu- og trivnaðarnevndini treytað av, at allar kommunurnar í oynni eru við og av, at kommunurnar eru samdar um, at kunningardiskurin á Krambatanga verður mannaður aftur í tíðarskeiðnum frá páskum til og við heystferiuna.

## Avgerð

Einmælt samtykt at víkja frá kravinum viðv. Krambatanga í býráðssamtyktini frá 08.10.2013, men tað er framvegis ynskiligt, at Kunningardiskurin á krambatanga verður opin aftur.

**16.00.00-A00-1-14**

## 3. Val av umboðum í upptøkunevdunum fyri eldrasambýli og ellis- og røktarheim

## Avgerð

Samtykt er, at Málið verður útsett til komandi býráðsfund.

**00.34.00-Ø20-3-13**

## 4. fígging av láni

## Avgerð

Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Eik Banka dagfest 25.11.2013 uppá lán áljóðandi kr. 23,75 mió, við 11 mió í 2013 og 12,75 mió 2014 við skiftandi rentu á 2,95% p.a. til byggjan av kei. Einmælt samtykt at heimila borgarstjóranum Kristin Michelsen og kommunustjóranum Jónleyg J. Bech at undirskriva hesi lán vegna Tvøroyrar Kommunu.

## Skjøl

- Dagsordenspunkt Fígging av láni behandlet på mødet 10. desember 2013 kl. 19 00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2013)

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-04 |
| Fundardagur | 12. februar 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-Ø00-1-14**

## 5. Skattainntøkur 2014

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2014, pkt. 1:**

Samtykt er, at

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri januar.

### Skjøl

- Skattainntøkurnar fyri januar

**17.21.01-P27-1-13**

## 6. Útbjóðing av skúlabarnakoyring

### Málsfrágreiðing

Arbeiðið umfatar alla ta dagligu skúlabarnakoyringina í kommununi, sum p.t. er 34 túrar (á uml. 3 km) um vikuna millum skúlan á Tvøroyri og skúlan í Trongisvági, og 16 rundtúrar í kommununi (á uml. 20,5 km) um vikuna.

Arbeiðstakarin hevur skyldu til altíð at hava kapasitet tøkan til 40 børn.
Tað er eitt krav at bussar, sum verða brúktir til skúlabarnaflutning, eru í góðum standi, lúka øll galdandi trygdarkrøv og eru rein og nosslig.
Góðskan á sjálvari tænastuni skal eisini vera á høgum støði.

Arbeiðstakarin skal í samráð við skúlaleiðslurnar leggja koyringina til rættis, so hon svarar við tann tørv, sum er.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-04 |
| Fundardagur | 12. februar 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 4. februar 2014, pkt. 5:**

Mælt verður til at bjóða skúlabarnakoyringina út til komandi skúlaár, t.v.s. skúlaárið 2014/2015. Mælt verður til at bjóða skúlabarnakoyringina út fyri 5 ár við møguleika fyri uppsøgn av sáttmála við einari ávísari freist.

**Fíggjarnevndin, 7. februar 2014, pkt. 6:**

Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini um at bjóða skúlabarnakoyringina út fyri 5 ár frá skúlaárinum 2014/2015 at rokna, við møguleika fyri uppsøgn av sáttmála við einari ávísari freist.

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini og fíggjarnevndini um at bjóða skúlabarnakoyringina út fyri 5 ár frá skúlaárinum 2014/2015 at rokna, við møguleika fyri uppsøgn av sáttmála við einari ávísari freist.

### Skjøl

- Skulabussur
- Koyring 2012-2013
- Sáttmáli um skúlabarnakoyring 2003 2004

**09.05.02-G01-1-13**

## 7. Oljudálking í Landshavninum á Krambatanga 25-09-2013

### Málsfrágreiðing

**Tekniska nevnd/ umhvørvisnevnd/ ferðslunevnd, 19. november 2013, pkt. 7:**

Mælt verður til, at kommunan sendir hjálagda skrivið til avvarandi myndugleikar í samband við oljudálkingina.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um gongdina í málinum.

### Skjøl

- Oljudálking á Krambatanga á Trongisvágsfirði 25.09.2013
- Bræv - Tekniska Deild
- Arbeiðsfrágreiðingar pr. dag

**08.00.00-G00-1-14**

## 8. Sigling hjá Norrønu

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um gongdina í málinum.

Einmælt samtykt vísandi til innlitslógina at biðja SSL um avrit av øllumskjølum fyri 2013 og 2014.

**00.00.00-A00-1-14**

## 9. Grannastevnur í Suðuroynni

### Avgerð

Einmælt samtykt, at borgarstjórin orðar eitt skriv saman við hinum borgarstjórunum í oynni, har heitt verður á sýslumannin at halda grannastevnu í hvørjari markatalsbygd í oynni, eisini um ongi mál eru til skránna.

### Skjøl

- skriv frá Politiinum

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2014-04 |
| Fundardagur | 12. februar 2014 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin** **Fundur lokin**

Kristin Michelsen: ____________________

Bjarni Hammer: ____________________

Hallur í Heiðunum: ____________________

Anita Vibergsdóttir: ____________________

Marjun Olsen: ____________________

Marit Poulsdóttir: ____________________

Jens Johannesen: ____________________